# NAUSEA EPIDEMICA Í FØROYUM

Eftir *R. K. Rasmussen*.x)

Hin 11. august 1938 varð hann, ið hetta skrivar, biðin at koma til $1\frac{1}{2}$ ár gamlan drong í bygdini M. Drongurin hevði saman við móður sínari í 3 mánaðir verið hjá skyldfólki á Hvítanesi við Tórshavn. Har var hann vorðin sjúkur hin 7. august og spýði. Dagin eftir lívsýki og 38,2°. Drongurin var tó ikki ússaligari enn so av sjúkuni, at móðirin hin 9. august kundi fara við honum aftur til heimbygdina. Her helt spýggjan og lívsýkin á, men tá ið kroppshitin nú var fallin, var drongurin uppi aftur og úti hin 10. og somuleiðis hin 11. august. Men út á dagin hin 11. kom spýggjan aftur, samstundis sum drongurin alt oftari hevði opning, sum skjótt var tunnur sum vatn. Um kvöldið varð læknin tí biðin at koma. — Hjá dronginum var tá einki sjúkligt hjá doktaranum at síggja. Longu dagin eftir var hann nógv betri, og skjótt var hann heilt frískur.

Henda stutta sjúkusögan hjá einum barni við lítlum fepri, spýggju og lívsýki tykist lítið eyðkend, men var kortini hin fyrsti sjúkutilburður í mínum læknadömi av einari umfarsjúku, sum uttan iva kom frá hesum barni og skjótt spjaddist um alla bygdina. Henda sjúkan hevði, sum niðanfyri verður víst á, yvirhövur somu eyðkenni sum tann

x) týtt hevur Jóhannes av Skarði

sjúkan, *A. Rischel*[1] greiðir frá í 1935: Epidemisk nausea? (Anholt), *E. Juel Henningsen*[2] nevnir í 1936: Ejendommelig Epidemi i Roskilde December 1935 (og í Filadelfia 1935), og sum tann umfarsjúkan, sum *Tage Meyling*[3] sá í hesum býi í 1943 og lýsti í 1944. Afturat koma so ritgerðir *H. Heidemanns*[4] og *Ejnar Sylvests*[5] frá 1949. Hetta eru alt greinir, sum prentaðar hava verið í Ugeskrift for Læger.

Umfarsjúkur av júst sama slag eru eisini kendar aðra staðni enn í Danmark og Föroyum, men tilburðirnir á Anholt, í Roskilde (og í Filadelfia), sum A. Rischel og E. Juel Henningsen hava skrivað um ávikavist í 1935 og 1936, tykjast at vera tær fyrstu. Í Stóra Bretlandi hava verið fleiri tilburðir. Hann, ið hetta skrivar, kennir fýra, sum eru sera átökir omannevndu donsku. 2 teir fyrstu vóru í 1936, hin triðji í 1938 og fjórði í 1942. Undir yvirskriftini »Epidemic nausea and vomiting« er skrivað um hesar tilburðir í British Medical Journal, og víst verður til omannevndu donsku ritgerðir frá 1935—36: *R. Miller & M. Raven*[6] 1936, *C. J. Storrs*[7] 1936,*J. D. Grey*[8] 1939 og *W. H. Bradley*[9] 1943. Tað er vert at geva gætur, sigur C. J. Storrs, tá hann skrivar um umfarsjúkuna, sum í februar 1936 kom til eitt bygdarlag í Cornwall, at ein flokkur av Dönum búði í hesum sama bygdarlag um heystið 1935. »Vit tora kortini ikki at geva teimum skuldina fyri ta umfarsjúkuna, sum fór at ganga fleiri mánaðir eftir, at tey vóru farin. Ígerðartíðin, sum er ógvuliga stutt hjá nausea epidemica, verður, um hesir Danir eru uppruni sjúkunnar, alt ov long — fleiri mánaðir. Vit vita heldur einki um, at teir donsku gestirnir vóru sjúkir.«

Nausea epidemica er eitt navn, sum eigur at vera vart umfarsjúkum við somu eyðkennunum sum henda. Hetta er so ein sjúka, sum kemur brádliga, sum snarljós av klárum himni, herjar á mong — bæði tilkomin og börn — í stutta tíð og á trongum umdömi. Hon hevur fleiri ferðir gingið sum umfarsjúka, ikki bert í vissum bygdalögum og býum,

men eisini í vistarskúlum og öðrum skúlum, í einari hermannabúð og á einum sjúkahúsi. Ígerðartíðin tykist vanliga at vera 1—2—3 samdögur, men hevur eisini verið eitt sindur longri. Sjúkdómseyðkennini eru hövuðpína, örilsi, vaml, spýggjan, lívsýki, búkillska, lendapína og vanliga eisini hiti; men ikki öll tey sjúku hövdu öll hesi sjúkdómseyðkenni. Sjúkdómseyðkenni frá nervalagnum eru so sum eingi, um nökur eru. Sjúkan varar vanliga tveir dagar, men kann eisini vara eitt sindur longur. Hin sjúki er vanliga frískur í somu lötu, sum sjúkdómseyðkennini eru burtur. Hann kendi seg ikki linan ella ússaligan aftaná, fekk heldur ikki varandi mein.

Ein riðil av öðrum læknum hava — somuleiðis í Ugeskriftet — skrivað um sjúku ella sjúkur, sum minna nógv um ta sjúkuna, sum henda greinin er um, men sum tó í nökrum megintáttum tykjast at víkja frá henni. Ritgerðirnar eru: *E. Svensgaard*[10]: En ny epidemisk Sygdom? 1946, *E. Meulengracht & J. Wendelboe-Jörgensen*[11]: Neuro-labyrinthis epidemica? 1947, *N. C. Borberg*[12]: »Vertigo epidemica« 1947, *Torsten Lindquist*[13]: Neuro-labyrinthitis epidemica 1947, *E. Roelsen*[14]: Neuro-labyrinthitis epidemica? Arachnoiditis? 1947, *Stig Thomsen*[15] 1947, *Knud Winther*[16,17]: Vertigo epidemica s. neuraxitis vertiginosa 1949 og 1952, *A. H. & A. L. Schleisner*[18]: Ødemata varia epidemica? 1949, *Herdis von Magnus*[19]: Isolering af tre Virusstammer af Coxsackiegruppen fra Patienter med meningeale Symptomer 1949, *K. Østerskov Jensen*[20] 1949, *Otto Rasmussen*[21]: En »ny« Sygdom? 1950, *Tönnes W. Matthiessen & S. H. Mygind*[22]: »Om vertigo epidemica« etc. 1952 og *T. Dalsgaard-Nielsen & Helge Hertz*[23]: Om »vertigo epidemica« 1952. Tað er óneyðugt at nevna sjúkdómseyðkennini. Tey eru lýst væl og virðiliga í *Knud Winthers* ritgerð 1952: Vertigo epidemica s. neuraxitis vertiginosa, og verður víst til hennara.

*E. Juel Henningsen* bað í 1941 læknar landsins um at savna saman upplýsingar um nausea epidemica og at

skriva um hesa sjúku; hann lovaði hjálp frá Seruminstituttinum til kanningarnar. Í 1949 vísti *Haakon Natvig*[24], at nausea epidemica og stafylococ-mateitran vóru átökar sjúkur.

Nausea epidemica, eisini kallað Roskildesjúka, er nevnd í flestum Medicinalberetninger frá 1936—1946. Í 1936 verður sagt frá o. u. 1100, í 1941 2042 sjúkutilburðum; annars liggja tölini ímillum 240 (1943) og 34 (1946). Aftaná 1946 er tögn um sjúkuna. — Í »Medicinalberetning for Færöerne« er sjúkan nevnd bert eina ferð. Í 1938, tá vóru 35 sjúk.

Sjúkan gekk víða í M. í august og september 1938, og hon kom í flestu hús. Tað var öllum greitt, at hetta var ein sjúka fyri seg, og at hon var komin frá omanfyri nevnda smádreingi, sum hevði borið hana við sær av Hvítanesi. Sjúkan gekk tí í M. undir navninum »hvítanesbúksjúkan«. Hon sendi eina lítla grein til grannabygdina N. Á somu tíð gjördust nökur sjúk í tí triðju bygdini L. Nakað samband ímillum umfarssjúkurnar í M. og L. kundi ikki ávísast; men tað er kortini orsök til at halda at hesar báðar umfarssjúkur hoyra saman. Ógjörligt er at siga, hvussu mong fólk fingu sjúkuna í M., helst vórðu nærum helvtin av teimum o. u. 250 fólkum í bygdini sjúk. Í N. vóru bert tvey — 2 konufólk — sjúk; tey hövdu verið í M., tá ið sjúkan var á hæddini har. Í L. við stívum 600 fólkum vóru savnaðar saman upplýsingar um 26; men tey vóru fleiri.

Síðan vita vit ikki vist um nakran sum hevði hesa somu sjúku fyrr enn í juli 1944. Tá kom aftur ein lítil umfarsjúka í L við 23 sjúkum. Har afturat 2 sjúk í einari lítlari grannabygd K við 6 húsum og stívum 30 fólkum, og 4 sjúk í einari aðrari bygd A tætt hjá við 17 húsum og o. u. 100 fólkum. Til saman 29 sjúk — öll í juli 1944. Aftur at hesum komu tvey sjúk í september sama ár í bygdini D við 39 fólkum í 8 húsum. Tilsaman í 1944 verða tað so 31.

Sjúkueyðkennini á farsóttunum í 1938 og 1944 eru heilt tey somu og kunnu tí takast saman undir einum. Upp-

lýsingarnar um tey nógvu sjúku í M í 1938 eru tíverri ov ófullkomnar. Hesin parturin av umfarsjúkuni í 1938 má tí leggjast til viks, tá ið sjúkueyðkennini verða at greiða. Har aftur ímóti kunnu teir 2 sjúkutilburðirnir í N. og teir 26 í L sama ár nýtast til hetta endamál, og sama er við teimum 31 sjúkutilburðunum í hinum 4 bygdunum har sjúkan gekk í 1944. Tað verða so tilsaman 59 sjúk, sum vit hava upplýsingar um.

Frammanundan er nevnt, at umfarsjúkan í 1938— ella ið hvussu er ein partur av henni — kom upp á Hvítanesi. Hvussu smádrongurin er vorðin smittaður, vita vit ikki. Vit vita um onga umfarsjúku har. So upprunin hjá umfarsjúkuni í 1938 er fullkomiliga ókendur, og sama er at siga um umfarsjúkuna í 1944.

Í 1938 vóru allir sjúkutilburðirnir í august og september. Í 1944 vóru 29 at síggja í juli mánaði, hinir tveir vóru í september.

TEIR 59 SJÚKLINGARNIR SKIFTIR EFTIR ALDRI OG KYNI

| | Undir 1. ári | 1—4 | 5—14 | 15-65 M. | 15-65 K. | 65— M. | 65— K. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1938 | 3 | 7 | 3 | 1 | 13 | | 1 | 28 |
| 1944 | 1 | 6 | 3 | 5 | 14 | | 2 | 31 |
| | 4 | 13 | 6 | 6 | 27 | 0 | 3 | 59 |

Sjúkan eirdi — sum í talvuni sæst — ongan aldur, men konufólk tykjast nógv áriniligari at fáa sjúkuna enn mannfólk. Og hetta bæði í 1938 og 1944. Tilsamans 30 konufólk og 6 mannfólk. Tó mega vit ikki gloyma, at í august—september 1938 vóru nógv mannfólk burtur undir Íslandi og við Grönland. Kríggsárið 1944 var eisini ein partur av mannfólkinum burtur í juli mánað.

Tað tykist avgjört, at sjúkan er smittsom; men kortini

hendi tað ongantíð, at öll í sama heimi vórðu sjúk. Við hvört fekk bert eitt sjúkuna. Hvussu tað sjúkdómselvandi virus var komið inn í likamið er ókent. Sjúkan breiddist fyrst og fremst innanveggja í húsinum.

Tilgerðartíðin var ivaleyst stutt. Tað gingu vanliga 1—3 dagar ímillum 1. sjúkudag hjá teimum ymisku húsfólkunum; men tað kundu ganga upp til 11 samdögur ímillum 1. og 2. sjúkutilburð í sama húsi. Hetta sigur sjálvandi ikki, at tilgerðartíðin hevur verið so long. Tann, sum seinast varð sjúkur, kundi vera smittaður uttanhýsis. Hjá einum sjúklingi kunnu vit avgera tilgerðartíðina nágreiniliga. Meðan umfarsjúkan í M í 1938 var á hæddini vóru tvey konufólk úr bygdini N har og vitjaðu. Tær vóru har frá kl. 16 til kl. 21. Júst 1 samdögur seinni gjördist annað av hesum konufólkunum sjúkt. Tilgerðartíðin var tá 1 samdögur. Hitt konufólkið varð sjúkt, tá ið uppaftur 1 samdögur var liðið. Hon kundi vera vorðin smittað í M ella av vinkonuni. Varð hon smittað í M, verður longdin á tilgerðartíðini 2 samdögur. Er vinkonan smittukeldan, verður tilgerðartíðin 1 samdögur eisini hjá henni.

Ikki altíð gjördust fólk órinin aftaná sjúkuna. Ein ung kona í L fekk t. d. umfarsjúkuna báðar ferðir, hon gekk í bygdini. Hon kendi sjúkuna aftur, tá hon í 1944 gjördist sjúk 2' ferð. Í 2 öðrum húsum í L. gekk sjúkan bæði í 1938 og 1944. Her eirdi sjúkan í 1944 öllum teimum fólkum, sum sjúk hövdu verið í 1938. Men tá ið sjúkan var liðug í 1944, vóru enn fólk í báðum húsum, sum hvörki hövdu verið sjúk í 1938 ella í 1944. Vit kunna tí ikki siga, at tey, sum sjúk hövdu verið 1938, sluppu undan sjúkuni í 1944 orsakað av órini.

Hjá smábörnum var sjúkan ikki so eyðkend sum hjá vaksnum. Hon var vanliga linari og vardi styttri. Við tað at nógv av teimum mest sermerktu sjúkueyðkennum (örilsi, hövuðpína, vaml, pína o. a.) eru mein, sum einans sjúklingurin sjálvur kennir og bert kunna koma læknanum til kunnleika við tí, hin sjúki sjálvur greiðir frá, var tað hjá

smáum börnum sum oftast bert möguligt at avgera sjúkuna, tá um somu tíð eisini vaksin í sama húsi ella millum næstu skyldfólk vóru sjúk.

Sjúkan kom altíð knappliga. Merkiliga nógv gjördust sjúk um náttina ímillum kl. 24 og kl. 6. Vit vita tó eisini um sjúklingar við teimum allarfyrstu sjúkubrögdunum um dagin og kvöldið. Komu tey fyrstu sjúkueyðkennini um náttina, vaknaði hin sjúki, sum um niðurfaringartíð livdi væl, við örilsi, hövuðpínu, ilt fyri hjartanum, ilt í búkinum og lendapínu, men ikki öll hövdu öll hesi sjúkueyðkenni. Summi kendu tað sum sjóverk, og ein einstakur kendi tað, sum hann var fullur. Aftrat komu viðhvört, men minni enn so altíð, spýggja og lívsýki. Tey kundu koma beinan vegin, tá einir tveir tímar vóru gingnir ella 1—2 dagar seinni. Ein 3 ára gomul genta gjördist sjúk og spýði, meðan hon spældi úti, og helt fram við at spæla (sí sjúkusögu VI). Tey kundu hava vaml leingi og eftir tað, at öll onnur sjúkueyðkenni vóru burtur — eina einstaka ferð 6—7 samdögur. Vaml var eitt av teimum fyrstu og vanligastu sjúkueyðkennunum, ofta tað allarfyrsta, og tað var ofta tað síðsta sum hvarv. Eisini örilsi vardi javnliga leingi. Tey flestu noyddust at liggja í songini, til tað ringasta var av. Einstök, sum vóru bert lítið sjúk, stríddust tó uppi alla tíðina. Illskan í búkinum sat ikki altíð bert fyri flagbróstinum. Hendingaferð kundi hon sita omanfyri blöðruna ella í lendunum. Hjá einum var húðin um búkin ovurviðkvæm.

2 sjónsk sjúkueyðkenni: Spýggja og leyst lív eru nevnd omanfyri. Afturat hesum koma onnur. 2 ferðir sást roði í hálsinum. Annar av hesum sjúklingunum hevði uttan iva krím og kanska kom hálstakið av tí. Tað sást ongantíð blóð í skarninum og lívsýkin var ongantíð so ógvislig sum við paradysenteri — ein sjúka, sum er innlendsk í Föroyum. Ein vertur av skarninum frá einum sjúklingi varð sendur til kanningar hjá Statens Seruminstitut. Svarið ljóðaði: Ongar sjúkuelvandi mikrobur. Tvær ferðir kendist skvatl í langabotninum. Hjá öðrum av hesum sjúklingunum kom

seinni leyst lív, hjá hinum ikki. Kanning av hjarta og lungum vísti, at her var einki sjúkligt. Aldri gulusótt. Kroppshitin næstan altíð hægstur beinan vegin, síðani líðandi fallandi. Aldri ov högur kroppshiti í meira enn 4 samdögur, ofta bert 1 dag og annars skiftandi frá lítlum hita til 40°. Tey allarflestu vóru bert sjúk í 1—3 dagar; eingin möðikensla aftaná.

*Sjúkusöga I.*

Kv. E. K. 29 ára gl. Dóttir og systurdóttir verið sjúkar. Sjálv sjúk $^{9}/_{9}$ 1938 kl. 4 M.: Hövuðpína, vaml, örilsi og lendapína. Kroppshitin um kvöldið 38,3. $^{10}/_{9}$ 37,1 og skvatl í langabotninum. $^{11}/_{9}$ frísk. Eingin spýggja og ikki leyst lív.

*Sjúkusöga II.*

Kv. K. J. 28 ára gl. Sjúk $^{12}/_{9}$ 1938. Vaknaði kl. 2 M. og hevði hövuðpínu, ilt fyri hjartanum, örilsi og lendapínu. Spýði fleiri ferðir. Ikki leyst lív. Kroppshitin ikki máldur. Uppi og úti sama dag. 2 börn í húsinum, men hvörki av teimum sjúkt.

*Sjúkusöga III.*

Kv. E. P. 29 ára gl. Sjúk $^{26}/_{9}$ 1938 kl. 21: Vaml, örilsi og ilt fyri flagbróstinum $^{27}/_{9}$ 38,7/37,4. Eym fyri flagbróstinum og niður ímóti blöðruni, ovurviðkvæm í húðini um allan búkin, tá húðin legðist í rukkur. Við 1. sjúklingavitjan $^{27}/_{9}$ enn eingin opningur, men skvatl í langabotninum. Dagin eftir leyst lív 3 ferðir, men annars frísk, kroppshiti var tá 36,8. Í húsinum maður og börn — einki av teim um sjúkt.

*Sjúkusöga IV.*

Kv. M. N. 26 ára gl. Frísk um morgunin $^{5}/_{7}$ 1944. Arbeiddi úti allan dagin. Ilt fyri hjartanum kl. 15, kendi seg

sjúka, mátti gevast at arbeiða kl. 9½ og fara til songar. Vaml alla náttina, eisini örilsi og pína fyri flagbróstinum. Kroppshitin máldur fyrstu ferð $^{6}/_{7}$, var tá 38,6/39,6. Hin $^{7}/_{7}$ 38,0/38,0 og $^{8}/_{7}$ 36,9/36,9. Onga tíð spýggja ella leyst lív, men vaml í fleiri dagar, og enn hin $^{11}/_{7}$ — 6 dagar eftir 1. sjúkudag.

Í sama húsi vóru umframt nevnda konufólk, faðirin, móðirin og 2 vaksnir bröður. Einki av teimum fekk sjúkuna. Men ein bróðurkona, sum búði í einum húsum tætt hjá og sonur hennara gjördust sjúk. Sjúkusöga bróðurkonunnar er niðan fyri (V).

### *Sjúkusöga V.*

Kv. J. N. 37 ára gl. Frísk um morgunin $^{6}/_{7}$ 1944. Sjúk kl. 15, kroppshitin tá 39°. Hevði vaml og pínu í lendunum. Spýði 3 ferðir frá kl. 15 til kl. 20. Kroppshitin nú 40°. Dagin eftir 39,0/39,1. $^{8}/_{7}$ 37,8. Var einasta konufólk í húsi. Noyddist tí at fara upp, men hevði enn ilt fyri hjartanum, og tað vardi við í fleiri dagar. Hevði eisini í fleiri dagar örilsi, tá ið hon bendi seg framyvir.

Í húsi vóru maður og kona og 2 börn undir 6 ár. Tað yngra, ein drongur upp á 2 ár, gjördist sjúkur $^{9}/_{7}$ kl. 1 um náttina. Vaknaði tá við spýggju, lá í seingini tann dagin og tóktist so at vera frískur. Ikki leyst lív. Um kroppshitan veitst einki. Hitt barnið og faðirin fingu ikki sjúkuna.

### *Sjúkusöga VI.*

Kv. S. V. 3 ára gl. Móðirin sjúk $^{20}/_{7}$ 1944. Móðursystir í einum öðrum húsi sjúk nakrar dagar seinni. Barnið sjúkt og spýði $^{31}/_{7}$ fyrrapartin, meðan tað spældi úti. Spýði fleiri ferðir, tveir teir næstu dagarnar. 2 ferðir tunnan opning $^{1}/_{8}$. Kortini lítið sjúk. Eitt sindur av fepri.

Hetta, ið her er skrivað, man óivað vísa, at umfarsjúkurnar í Föroyum í 1938 og 1944 eru epidemisk nausea.

Sjúkueyðkenni eru at kalla tey somu, og lítið er at leggja aftur at tí, sum *A. Rischel, E. Juel Henningsen, Tage Meyling, H. Heidemann* og *Einar Sylvest* hava skrivað.

Eitt sindur leggja tó tær föroysku farsóttirnar aftrat tí, vit vistu. Konufólkini vórðu oftari smittað enn mannfólkini. Vit vita vist, at eitt menniskja fekk sjúkuna 2 ferðir: Eitt konufólk varð sjúkt bæði í 1938 og 1944. Longdina á tilgerðartíðini kundu vit nágreiniliga avgera hjá einum einstökum sjúklingi; hon var 1 samdögur. Hjá einum öðrum var hon í mesta lagi 2 samdögur. Í einum einstökum föri hövdu vit ovurviðkvæmi í húðini um búkin við 1. sjúklingavitjan, og hjá tveimum sjúklingum merktist týðuliga skvatl í langabotninum.

### *Summary.*

Two outbreaks of Epidemic nausea and vomiting occured among the general population in some villages in Faroe Islands in July-August-September 1938 and 1944. 59 cases (children and adults) are referred to. The signs were: headache, giddiness, nausea, vomiting, abdominal aching, diarrhoe and usually fever. Incubation period generally 1—2—3 multiply 24 hours. Duration few days.

### *Bókmentir*

1. *Rischel, Axel:* Epidemisk nausea? U. f. L. *97*, 1285, 1935
2. *Henningsen, E. Juel:* En ejendommelig epidemi i Roskilde. December 1935. U. f. L. *98*, 45, 1936.
3. *Meyling, Tage:* En epidemi af Roskildesyge ved en Udrykningskolonne, U. f. L. *106*, 1118, 1944.
4. *Heidemann, H.:* Nausea epidemica? U. f. L. *111*, 810, 1949.
5. *Sylvest, Ejnar:* Nausea epidemica, U. f. L. *111*, 962, 1949.
6. *Miller R.*, and *M. Raven:* Epidemic nausea and vomiting, British Medical Journal. 1936, 20' June, 1242.
7. *Storrs, C. E.:* Epidemic nausea and vomiting. British Medical Journal. 1936, 27' June, 1321.

8. *Gray, J. D.:* Epidemic nausea and vomiting. British Medical Journal. 1939, 4' February, 209.

9. *Bradley, W. H.:* Epidemic nausea and vomiting. British Medical Journal, 1943, 13' March, 309.

10. *Svensgaard, Elisabeth:* En ny epidemisk Sygdom? U.f.L. *108*, 362, 1946.

11. *Meulengracht, E.*, og *J. Wendelboe-Jörgensen:* Neurolabyrinthis epidemica? U. f. L. *109*, 613, 1947.

12. *Borberg, N. C.:* »Vertigo epidemica«, U. f. L., *109*, 671, 1947.

13. *Lindquist, Torsten:* Neuro-labyrinthitis epidemica, U. f. L., *109*, 695, 1947.

14. *Roelsen, E.:* Neuro-labyrinthitis epidemica? Arachnoiditis? U. f. L., *109*, 695, 1947.

15. *Thomsen, Stig:* Neuro-labyrinthitis epidemica? U. f. L. *109*, 696, 1947.

16. *Winther, Knud:* Nausea epidemica — vertigo epidemica, U. f. L., *111*, 1079, 1949.

17. *Winther, Knud:* Vertigo epidemica (S. Neuraxitis vertiginosa): U. f. L., *114*, 1368, 1952.

18. *Schleisner, A. H.* og *A. L.:* Ødemata varia epidemica. U.f.L., *111*, 1392, 1949.

19. *Magnus, Herdis von:* Isolering af tre virusstammer af coxsackiegruppen fra patienter med meningeale Symptomer, U. f. L., *111*, 1451, 1949.

20. *Jensen, K. Østerskov:* Ødemata varia epidemica. U. f. L., *111*, 1455, 1949.

21. *Rasmussen, Otto:* En »ny« Sygdom? U. f. L., *112*, 802, 1950.

22. *Matthiessen, Tönnes W.*, og *S. H. Mygind:* Om »Vertigo epidemica« etc. U. f. L., *114*, 337, 1952.

23. *Dalsgaard-Nielsen, T.* og *Helge Hertz:* Om »vertigo epidemica«. U. f. L., *114*, 437, 1952.

24. *Natvig, Haakon:* »Nausea epidemica« og stafylokokk-matforgiftning. U. f. L., *111*, 1080, 1949.